# Sosialurin niðurger Búskaparskipan Landsins

PETUR ALBERG LAMHAUGE



Mikudagin 7. februar viðger Sosialurin í oddagrein "Búskaparskipan Landsins". Í oddagreinini verður skipanin nevnd ótíðarhóskandi og óbrúkilig, og Sosialurin spyr, um Bárður Nielsen, landsstýrismaður er leiddur í KT-óføri. Eisini verður spurnartekin sett við kostnaðin av skipanini.

Ein kann undrast á, hvat grundarlag Sosialurin hevur fyri at skriva eina tílíka grein. Blaðið hevur í hvussu so er ikki spurt seg fyri hjá teimum, ið hava ábyrgd av Búskaparskipan Landsins - Fíggjarmálaráðnum og Føroya Gjaldstovu.

Verunleikin er tó ein heilt annar, enn róð verður uppundir í Sosialinum, men áðrenn komið verður inn á sjálva skipanina, skal eg tó greiða eitt sindur frá forsøguni til búskaparskipanina.

Støðan í fyrru helvt av nítiárunum var hon, at vit landsbúskaparliga vistu ikki, hvar vit vóru og hvar vit vóru á veg. Táverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard gjørdi tí av, at skil skuldi fáast á búskaparstýringini í Føroyum, og avgjørt var tí at fara undir at menna eina felags búskaparskipan fyri alla landsumsitingina. Land okkara er ikki størri enn ein minni kommuna í grannalondunum, og tí var mett, at tað gav onga meining, at vit í Føroyum skuldu hava fleiri búskaparskipanir, og fyri at tryggja okkum bíligastu loysnina, varð skipanin sett í útboð.

Allir landsstýrismenninir í fíggjarmálum síðani Jóannes Eidesgaard, Anfinn Kallsberg, Karsten Hansen og nú Bárður Nielsen hava raðfest Búskaparskipan Landsins høgt, soleiðis at skipanin alsamt kann stuðla upppundir tann fíggjarstýringartørv, landið hevur.

Aftur til støðuna í dag. Búskaparskipan Landsins er regluliga uppstigað síðan hon varð sett í verk miðskeiðis í nítiárunum, og er í dag mest framkomna KT-skipan innan ta almenna í Føroyum. Talan er um eina sameinda loysn, ið er fult alnet-grundað. Partsloysnir eru skipaðar í einum portali, atkomuligur á alnetinum. Data og dátur til leiðslukunning eru skipaðar í einum dátuvøruhúsi. Harafturat er ein sera framkomin leiðslukunning ment. Neyðugur peningur er eisini nýttur til KT-trygd, soleiðis at miða verður eftir at lúka tey høgu KT-trygdarkrøvini. Nevnast kann eisini, at sera stórur áhugi er fyri skipanini uttanlands. Boð eru javnan eftir fólki frá gjaldstovuni, um at koma uttanlands at halda fyrilestur og greiða frá skipanini.

Viðvíkjandi kostnaðinum av skipanini er at siga, at báðar høvuðsskipanirnar eru bodnar út. Eisini eru aðrar partsskipanir bodnar út. Hetta eigur at tryggja bíligasta kostnað.

Lagt kann verða afturat, at føroyska fyritøkan Samteld, er ein av høvuðsveitarunum, tá ið umræður Búskaparskipan Landsins. Ta einu høvuðsskipanina "Felags Lønarskipan", hevur Sam-teld ment alla sum hon er.

Trupulleikin er bert, at hóast tað í Føroyum er ment ein sera framkomin búskaparskipan, verður arbeitt hart fyri at sleppa uttanum hesa skipan, og úrslitið verður, at gjøgnumskygni í samfelagnum ikki verður tað, sum tað kundi. Politiska skipanin fær ikki tað upplýsing hon annars átti at fingið. Fíggjarstýringin verður ikki so góð sum hon átti, og samanlagt verður tað dýrari fyri samfelagið at hava fleiri búskaparskipanir, heldur enn eina.

Einki er at ivast í, at tað á hillunum hjá KT-handilsmonnunum standa fíggjarstýringsskipanir, ið hvør í sínum lagi eru vælegnaðar til einstakar almennar stovnar, men umráðandi er, at eisini stovnsleiðarar hugsa yvirskipað, og ikki "suboptimera". Teir eiga jú ikki sínar stovnar, men eru partur av einari heild.

Samanumtikið má sigast, at Búskaparskipan Landsins er eitt av allar størstu frambrotum hjá føroyskari fyrisiting.

Argir, tann 12. februar 2007

# Hugsar landspolitikarin landspolitiskt

JÓGVAN VIÐ KELDU
løgtingsmaður í Norðoyggjum



Tað verða ikki fiskavirkini og fiskiloyvini, sum einsamøll fáa yngra ættarliðið út á økini eftir loknað útbúgving.

Seinastu tíðina hevur nógv tíð verið brúkt í kjakinum um Føroyar skulu gerast eitt valdømi, tí so verður arbeitt landspolitiskt og ikki sum nú, at "økini uttan fyri høvuðsstaðin bara krevja", som tíðum verður tikið til. Tað skal verða meiri friður á økinum.

Nú skal fiskivinnulóggávan broytast, soleiðis, at eingin skal eiga meira enn 20% av einum vinnuubólki ella fiskidøgum, tí vinnan tykist ganga ov væl og vit hava í so sterkar fyritøkur. Hóast hesa hugsan, so eru ikki meiri enn stívliga 10 ár gingin síðani, landskassin og privatir persónar í felag mistu upp ímóti einari milliard krónur í eini vandafullari vinnu. So eg ivist stórliga, um henda lógarbroytingin er klók. Eg meini ikki!

Hetta eru bert tvey dømi um, at tað sum í høvuðsheitum virkar ynskist broytt.

**Fæst valla at virka betri**

Valskipanin virkar væl sum er, og vit skulu minnast til, at í eini valskipan er ikki millimeturrættvísi tað snýr seg um, men eitt yvirorðnað "rættvísi" sum ger, at fleiri dimensjónir verða tiknar við. Tað haldi eg teir serkønu eru samdir um.

Fiskivinnulóggávan virkar væl, hon fæst valla at virka betur, hon kann virka øðrvísið men ikki sum heild betur, uttan at øvundin kanska verður meiri mettað hjá ávísum pørtum. Eftir nýggju lógarbroytingunum eru øll tekin til, at tað fer at virka verri, umsitingin gerst tyngri m.a. tí eftirlitið verður styrkt, alt gerst tyngri hjá vinnuni, harvið fiskimanninum og dynamikkurin økist avgjørt ikki. Tí kann spurningurin setast, um ikki verður nøgdsemi fyrrenn vit hava ein lutvísan politistat.

Politikarin uttanfyri miðstaðarøkið skal vita, at alt hetta er við fyri at sáa meiri split í, fyri at fáa tað sum gongur at steðgað upp, at økja miðsavningina við størri umsiting.

**Privatvirki og umsitingar eiga at fylgjast**

Ein høvuðsstaðarpolitikari hugsar ikki landspolitiskt og politikarar uttanfyri miðstaðarøkið hava enn ómetaliga sjáldan, kunnað verið samdur um nakað veruligt.

Tað hevur alt ov leingi verið sannleikin, at bara eitt øki fær eitt flakavirki ella nøkur fiskiloyvi, so verður framburður langt inn í framtíðina. Hetta er hvørvusjón.

Vit mugu semjast um, at økini úti um í landinum, gerast sterkari, størri og leggjast meiri saman. Tað kann hvørki politikari í høvuðsstaðnum ella uttan fyri høvuðsstaðin verða ósamdur um, og tað má gerast nú.

Síðani verða spakuliga umsitingarligar eindir bygdar upp, tí sum sagt, at tað verður svangligt hjá yngra ættarliðinum at koma aftur til økið eftir lokna útbúgving, um ikki umsitingarligu eindirnar fylgja við út á økini.

Tað er nú tíð uppá, at vit bæði politikarar umboðandi høvuðsstaðin og uttanfyri fara at hugsa landspolitiskt og taka veruleikan í álvara.

(Fjórða grein av í fimm um sama evnið)
www.keldu.com
keldu@post.olivant.fo

# NØL, MAS, SKRITT DRÁL, TROK, FET Sikkin eitt sprok!

EYÐUN Á BORG



Virknir hondbóltsspælarar siga mær, at hasi trý ótespiligu orðini framvegis verða brúkt millum hondbóltsfólk.

Eitt er, at teir gomlu gubbarnir og tær gomlu gummurnar brúka tey av gomlum óvana, men vónandi verða børnini ikki lærd at siga tey í tí Harrans ári 2007?

Orsøkin til, at orðini verða søgd á donskum, kann ikki vera, at tað er trupult at siga tey á føroyskum, tí tey føroysku orðini eru bæði stutt og snøgg!

NØL=DRÁL,
MAS=TROK,
SKRITT=FET

Gott í tykkum, brúkið nú tey føroysku orðini!

E.S. Til lukku, steypsvinnararnir!

Við handbóltskvøðu
Á Borg á Argjum um valentinusarmundið 2007

# Nationalsymbolisma

JOHAN SAMUELSEN

Tvey orð sum hóska væl til alt tað, sum Tjóðveldisflokkurin stendur fyri politiskt, eru symbolisma og retorikkur. Besta dømi í so máta er aktuelli spurningurin um føroyska sendistovu í Reykjavík. Poul Michelsen, løgtingsmaður, spurdi, og so sjálvandi hin spyrjiglaði Høgni Hoydal honum á baki, hví vit skulu vera so ússalig at seta sendistovu á stovn við føroyskum borðflaggi í kjallaranum á donsku sendistovuni í íslendska høvuðsstaðnum, meðan danska ríkisvápnið og Dannebrog veitraðu í íslendska lotinum uttanfyri, sum jú er kravt sambært Wienarkonventiónini um ambasaduvirksemi landanna millum.

Løgmaður, Jóanes Eidesgaard, vísir á í bløðunum, at vit fysiskt flyta í egin hølir í Reykjavík, við okkara egna flaggi, Merkinum, í húnar hátt og veðramerki føroyinga á sjónligum staði. Men hetta er ikki í lagi hesaferð, sambært Høgna Hoydal - hóast júst sami Høgni helt, at tað var í fínasta lagi at seta føroyska sendistovu á stovn í London, meðan hann og hansara sonevnda fullveldissamgonga sat í Tinganesi, og júst á donsku sendistovuni í bretska høvuðstaðnum við bæði týðiligum Dannebrog og ríkisvápni sum skjaldramerki.

Nú fer hetta so ikki at henda í Reykjavík. Føroyingar fáa egin hølir við flaggi og veðrasegli har, men nú verður mótmælt harðliga – enntá frá teimum, sum onki høvdu at vísa á á uttanríkispolitiska økinum eftir 6 ár í Tinganesi. Ikki verður eitt orð grett um handilsliga og vinnuliga frambrotið við stóru fyrimununum, sum tað inniber, við føroyskari umboðan í íslendska høvuðstaðnum. Nú Íslandssáttmálin er farin at virka, og londini bæði eru vorðin eitt marknaðar- og handilsøki, er slík umboðan sera vælkomin fyri tey, sum vilja royna seg á fyrsta sinni á hesum stóra og óroynda marknaði fyri okkara vinnufyritøkur – slík diplomatumboðan er næstan ein fyritreyt fyri føroyskari kapping á nøkulunda jøvnum føti á íslendska marknaðinum, men tað sum hevur við gerandisdag og knoss hjá okkara vinnufyritøkum at gera, leggur Tjóðveldisflokkurin ikki petti lag í, teimum so líkt! Heldur varðveita retoriska og symbolska øsingartaktikkin í einum bíligum politiskum spæli her heima, um eitt "alt ella onki" í Reykjavík. Og harmiligast av øllum: fjølmiðlarnir fylgja í somu sporum, sum Høgni Hoydal, og jabba allir meiri ella minni um flaggsspurningin, meðan avgjørdu fyrimunirnir fyri føroyskt vinnulív við føroyskum umboðum í Reykjavík valla verða lýstir við einum orði – hoyrdi ikki henda spurning viðgjørdan í heila tikið, tá talan var um Londonambassaduna fyri fáum árum síðani!

Tað bar væl til í London á donsku sendistovuni, men í Reykjavík, nei, har er tað tjóðskaparligt afturstig, ússaligt o.s.fr. at vera í egnum hølum undir Merkinum – og fyri at gera undirbrotligheitina fullkomna í hesum máli, so siga "nationalsymbolistarnir" hjá okkum, at í Íslandi, har eru serligar mentunarligar og søguligar orsøkir til at vísa, hvør man er! Also, ein praksis á uttanríkispolitiska økinum í London, annar í Reykjavík – minnir mest um holbergskt skemt! Onkur fór enntá so langt í tjóðskapaligum herðindum í løgtinginum, sum at krevja republikkina setta á stovn her og nú, so flaggmøguleikarnir í Íslandi blivu optimalir! Men ikki eitt gleðiligt orð um fyrimunirnar av at hava føroysk umboðsfólk við diplomatstatusi í Íslandi, t.v.s. við atgongd og møguleikum at virka og ávirka til frama fyri føroyingar í íslendska høvuðsstaðnum, nú so nógv nýtt skal roynast á fyrsta sinni í felagsmarknaði okkara føroyinga og íslendinga millum, nú Hoyvíkssáttmálin skal standa sína roynd, sum undirskrivaður varð av Jóanesi Eidesgaard, løgmanni og Davidi Oddson, forsætisráðharra.

Vónandi fer Hoyvíkssáttmálin at slóða fyri einum blomstrandi felagsmarknaði báðum londum at frama. Men uttan okkara egnu umboðsfólk við diplomatstatusi í Reykjavík, var kappingin tapt í forhond.

Súru bert tjóðvedismanna byggja onki land.